# Brek og ósketni elvdu til SAS-vanlukkuna

SAS fer ikki at taka støðu til eitt møguligt endurgjaldskrav enn.

Tað er niðurstøðan í einari fyribilsfrágreiðing hjá italsku nevndini, sum hevur kannað tilburðin, tá eitt flogfar hjá SAS og eitt lítið týskt privatflogfar stoyttu saman í Linate-floghavnini í Milano í síðsta mánað.

Nevndin gevur italsku flogferðslumyndugleikunum Enav av grovfílini, tí lítið og einki skil var á mannagongdini og fleiri tekniskum tólum í floghavnini.

Nevndin sigur m. a., at signalskipanin, sum villleiddi tað lítla týska flogfarið út á skeiva breyt, lýkur ikki tey vanligu krøvini, sum slíkar skipanir skulu lúka. Samstundis vísir nevndin á, at radarin, sum skal fylgja við tí, sum hendir í sjálvari floghavnini, hevði ikki virkað í eitt heilt ár. Tað hevði við sær, at eftirlitstornið varnaðist ikki tað lítla Cessna-flogfarið í tí tjúkka mjørkanum, sum var hendan morgunin.

Talsmaðurin hjá SAS segði í gjár, at felagið fer ikki at taka støðu til møguligt endurgjaldskrav, fyrr enn tann endaliga frágreiðingin hjá italsku kanningarnevndini er liðug.

Tað hevur verið nevnt, at teir báðir flogleiðararnir, sum vóru til arbeiðis í Linate hendan morgunin, vóru alt ov gáloysnir, og at teir kundu fyribyrgt vanlukkuni. Hesin spurningurin verður ikki umrøddur í fyribilsfrágreiðingini.

Italska stjórnin var í øðini, tá tað fréttist um tann vánaliga standin í Linate-floghavnini, og stjórnin boðaði alt fyri eitt frá, at tilburðurin skuldi kannast út í æsir.

# Mótakvøld í Runavík

**Tíðindaskriv**

Hóskvøldið 8. november verður eitt av teimum vælumtóktu mótakvøldunum í Runavík.

Mótakvøldið verður hesuferð hildið í hølunum hjá kappróðrarfelagnum NSÍ, og byrjað verður klokkan 19.30.

Handlarnir, ið eru við eru: Shop-in, Shari, Hygg Inn, Orkis, Jungman, Hjá Sannu, Jallur, Chic, Fotomiðstøðin og Deild C.

Meðan mótasýningin er, verður borðreitt við croissant v/salat, smákøkum, umframt kaffi og te.

Tá mótasýningin er liðug hava luttakandi handlar opið til klokkan 24.00.

Kostnaðurin fyri alt kvøldið er 100 krónur.

Atgongumerki eru til keyps í Kiosk Vár, Statoil í Saltangará og á Kunningarstovuni í Saltangará frá 1. november.

# Sólin skínur í Fragd & Fimi



*Jana Eidesgaard Thomsen avmyndað frammanfyri Sun City við Fragd & Fimi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nú veturin nærkast og tað er við at gerast kaldari í veðrinum, munnu tað verða mong, sum leita sær í tær ymsu sólmiðstøðirnar í Havnini. Fragd & Fimi Yviri við Strond í Havn, hevur júst fingið spildur nýggjar sólir, so nú kunnu øll, ið ynskja tað, leita sær ein túr í Sun City at verma seg og harumframt fáa eitt sindur av liti**

SÓLIR
*Ingrid Bjarnastein*

Tær fýra sólirnar, sum eru í kjallaranum í Fragd & Fimi eru sokallaðar UWE sólir. Tað, sum er serligt við hesum UWE sólunum er, at tær brúka meira streym, og tað vil siga, at tær nýtist minni tíð til at gerast brúnur enn við øðrum sólum.

- Vit eru einaumboð fyri UWE sólir í Føroyum, sigur Jana Eidesgaard Thomsen, sum rekur Fragd & Fimi.

- Um tú til dømis plagar at taka sól í 16 minuttir, so nýtist tær bert at brúka 12 minuttir í nýggju UWE sólunum.

## Breeze og aroma

Sum nakað heilt nýtt hava sólirnar í Sun City »breeze« og »aroma«. Hetta er nakað, ið ein kann stilla inn sjálvur. Um trýst verður á ein knøtt kemur dampur úr sólini, og um trýst verður á ein annan knøtt kemur eitt slag av vælangandi lukti úr endanum á sólini.

- Til ber at keypa sólkort, sum bert kunnu nýtast her, greiðir Jana frá.

- Ofta verður gloymt at veksla, men her ber til at brúka bæði seðlar og myntir. Tá tú brúkar sólkortið fært tú 10% avsláttur fyri hvørja ferð. Annars kosta seks minuttir 30 krónur. Fyrimunurin við sólkortinum er, at so sleppur tú frá at hava pengar við, og harumframt kann sólkortið nýtast av allari familjuni.

Styrkin til sólirnar kann stillast inn, soleiðis, at tú sjálvur velur, hvussu sterkar tær eru, og hvussu nógva luft tú vilt hava at blása. Eitt annað nýtt við sólunum er, at tær hava ein sokallaðan »bingo«-knøtt. Hesin knøttur verður nýttur, um tú vilt hava tveir minuttir eyka av andlitssólini. Tá vanliga sólin er sløknað heldur andlitssólin fram í tveir minuttir eyka.

- Vit fara eisini at fáa eina kremmaskinu, sum skal standa í gongini, men hon er eitt sindur ov sein. Hon kemur helst fyrst í komandi viku, fortelur Jana.

- Har kanst tú keypa ymisk krem. Okkurt krem verður til at smyrja á áðrenn, so tú verður skjótari brúnur. Eisini verður okkurt annað krem, sum heldur uppá fuktin í húðini.

Sun City sólirnar hava øðrvísi rør enn aðrar sólir. Til dømis eru akslaperurnar deildar sundur í tvey, soleiðis at tú ikki brennur teg í skallan um tú hevur tunt hár. Harafturat eru rør á síðunum, og andlitssólin hevur 12 dupultar perur. Umframt alt hetta hava sólirnar eina »lightglass« plátu sum ger, at strálurnar deila seg betur, og liturin kemur skjótari á.

- Vit lata upp í dag klokkan 13.00 og vit fara at hava opið frá klokkan 7.00 um morgunin til klokkan 23.00 um kvøldið. Sjálvt um sólirnar hoyra til Fragd & Fimi verða fólk noydd at ganga inn í kjallaranum, sigur Jana Eidesgaard Thomsen at enda.

# Yvirgangsmenninir rýmdir undan amerikansku bumbunum

Fleiri limir í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda skulu vera rýmdir úr Afghanistan við kós ímóti Evropa og Amerika.

Osama bin Laden og menn hansara halda eftir øllum at døma, at tað er meiri umráðandi at skipa fyri yvirgangsatsóknum í Vesturheiminum enn at verja Taliban-stýrið í Kabul.

Amerikanska tíðarritið News Week skrivar, at millum 150 og 200 menn hjá bin Laden eru rýmdir úr Afghanistan síðani atsóknirnar í USA tann 11. september. Teir eru flýddir um markið til grannalondini, og sagt verður, at teir flestu hava kós ímóti t. d. Bretlandi og Týsklandi.

News Week veit at siga, at teir flestu menninir hjá bin Laden hava verið í pakestanska býnum Peshawar á vegnum. Har hava teir útvegað sær nýggj pass og flutning til Vesturheimin. Prísurin fyri pass og skjúts er sambært blaðnum millum 160.000 og 270.000 krónur.

Eygleiðarar halda, at avdúkingin í News Week kann vera orsøkin til, at amerikansku myndugleikarnir eru farnir at tosa um, at teir vænta fleiri yvirgangsatsóknir.

Hóast millum 150 og 200 menn hjá al-Qaeda eru rýmdir undan amerikansku bumbuálopunum, hevur bin Laden framvegis einar 5000 vápnaðar menn eftir í Afghanistan.

*(Fartekst)*



# Fáa sakførara at hjálpa sær at gera kirkjugarð

**Sumbingar sleppa ikki at byggja kirkjugarðin út fyri fornfrøðingunum. Nú hava teir biðið sakførara kanna málið**

SUMBA
*Áki Bertholdsen*



*Sumbingar kommuna hevur í mong á stríðst við fornfrøðingar um loyvi at gera kirkjugarð. Men teir eru treiskir og gevast ikki so, og nú hava hava teir biðið sakførara kann málið. Fimm mans eru í bygdaráðnum í Sumba. Hinumegin borðið eru teir f.v. Niclas Hentze, Jacob Poulsen og Snæbjørn vestergaard. Hesumegin eru teir Poul Johannes Poulsen, við rygginum til og Jacob Vestergaard, borgarstjóri*

Sumbingar eru nú við at koma í neyð av kirkjugarðinum.

Kirkjugarðurin er við at vera fullur. Men at byggja hann út, vísir seg ikki at vera bara sum at siga tað.

Sumbingar hava í fleiri ár ligið í stríði við fornfrøðingarnar um kirkjugarðin í Sumba.

Í fleiri ár hevur ætlanin hjá bygdaráðnum verið at byggja kirkugarðin, sum er, út.

Men fornfrøðingarnir hava lagt seg í vegin og hava forðað fyri útbyggingini.

Málið var einaferð enn umrøtt bygdaráðsfundi í Sumba mánakvøldið. Eftir tí, sum kom fram á fundinum, halda fornfrøðingar, at plássið, har ætlanin er at byggja kirkjugarðin út, hevur fornfrøðiligan týdning. Eitt nú halda teir, at tað er har, tann gamla búsetingin í Sumba er.

Hetta er eitt gamalt mál, sum stríð hevur verið um í fleiri ár.

Sumbiar Kommuna hevur tosað við nógvar myndugleikar um tað, eitt nú við einar fýra ella fimm landsstýrismenn í mentamálum.Teir hava tó allir rætta seg eftir fornfrøðingunum og hava ikki viljað givið sumbingum loyvi til at byggja kirkjugarðin út.

## Royn aftur

Men sumbingar eru treiskir í hesum máli og gevast ikki so.

Teir halda ikki, at tað er nøkur haldgóð grundgeving fyri at nokta sumbingum at byggja kirkjugarðin út.

Teir vísa eisini á, at tá ið Kommunan fyri nøkrum árum síðani gróvu út, sóknaðust teir eftir einum plássi at leggja moldina á og fingu ávíst stykkið, har ætlanin nú er at byggja krikjugarðin út. Teir vísa eisini á, at ein broyt hevur verið á stykkinum og rundvelt alt.

Teir siga eisini, at ymsar meiningar eru um, antin tað nú var har, at tann gamla búsetingin var.

– Hevur stykkið nakrantíð havt fornfrøðiligan týdning, hevur tað í øllum førum ongan týdning longur, eftir at øll moldin er lagt har og eftir at ein broyt hevur rundvelt alt.

Teir halda eisini, at økið misti allan fornfrøðiligan týdning, tá ið kirkjugarðurin varð lagdur har upprunaliga.

Og teir halda, at tað er heilt burturvið, at teir skulu vera noyddir at gera kirkjugarð heilt av nýggjum onkra aðrastaðni í bygdini, tí tað er ógvuliga kostnaðarmikið, tá ið tað ber til at byggja kirkjugarðin, sum er, út, nógv bíligari.

Á bygdaráðsfundi mánakvøldið varð tí gjørt av at biðja sakførara kanna málið. Hann skal kanna, hvørjar heimildir fornfrøðingarnir hava at noktað sumbingum at byggja út.

# Om soler på jorden, om to klovner, og om det å høre til

Willy R. Kastborg
Dagbok fra et liv.



Jeg vander på en sti i et fjell, og møter et menneske. Jeg går langs en gate i en by, og møter et annet menneske. Jeg kommer inn i en kafé på en flyplass, og møter enda et menneske.

Tre mennesker jeg aldri har kjent.

Jeg står i kabinen i et fly, og møter et menneske jeg kjenner.

I myldret av mennesker jeg treffer denne vinterlig hutrende dag er det disse fire jeg ser.

Den unge mannen på fjellstien. I genser, vindjakke, kortbukse og kraftige vandrestøvler. Barhodet. Med våte, hvite snefnugg i det lange mørke hår. Jeg ser de brede gladmuntre smil i hans ansikt da han på syngende nordlandsk ønsker lykke på min ferd.

Den høye, vakre kvinnen i bygaten, som bare er et vennlig blikk og et nikk i det hun passerer forbi.

Den lille piken i kaféen med olivenhud og ravnsvart hår. Med tindrende øyne som spiller lykkelig-flirtende ut mot menneskene omkring. Så uendelig levende. Så uendelig skjønn.

Hun som heter Annika. Henne jeg kjenner, og setter pris på. Blond. Flott. Tiltrekkende. Utstrålende varm kvinnelighet.

Der er ingen sol på himlen denne dag. Himlen er ubrutt grå. Skyene mørke og truende. Det faller tett snøblandet regn. I dette bedrøvelige vær er disse fire ulike mennesker soler som lyser opp i min dag.

Det bor to klovner i vårt hus. Der har vide, farvestrålende drakter. Deres ansikter er hvitsminkete. Deres munner er klarrøde. De er søsken. Deres navne er Petrinius og Petronella.

Jeg forteller dem at solen ikke bare er på himlen. Den er også på jorden. Det finnes mennesker som er en sol. De sier, at det vet de da godt.

– De er i din nærhet, sier de. Du ser det bare ikke alltid. Solen i henne du elsker. I barna, som med latter og glade hilsener forgyller din vei. I naboen som hjelper med alt det du i din ubehjelpelighet ikke makter. I vennene. De nære, og de fjerne. I alle som hjertevarmt ønsker »vel heimkomen« når du er tilbake fra dine reiser.

– »Heimkomen«? spør jeg. Hvor er hjemme? Jeg har bodd på landsbygden, og i mange byer i flere land. Jeg har hjemme alle steder, og ingen steder. Hvor hører jeg til?

Jeg husker et sted. Tilbake i fortiden. Jeg står ved vinduet i et lite bondehus i de värmlandske skoger. Jeg ser ut på små, strevsomt dyrkede marker. Jeg ser de svarte furene i en gammel potetåker. Jeg ser bærbusker, frukttrær og et eldgammelt tuntre. Skjevt og forkrøblet. Jeg ser en smal, gruset gårdvei, og et tjern. Jeg ser en fiskehauk fly speidende over der abbor og gjedde vaker i vannflaten. Og overalt ser jeg skogen. Bjerkene, furuene og de mektige graner.

Huset har bare to rom. Et kjøkken med bord, sittebenker, et skap og en stor svart vedkomfyr. En sparsomt møblert stue hvor sengebenkene står oppredde langs veggene. I en svartmalt gyngestol sitter min mormor. Med sitt stramt gredde gråhvite hår, og sitt milde rynkede ansikt.

I dette hus er min mor født. I en seng morfar hugget til av tre fra sin skog. I disse rom har hun krabbet. På disse gulv har hun reist seg, og gått sine første vaklende skritt. Her har hun lekt. I kjøkken, fjøs, i skogen og på åkrene utenfor har hun arbeidet alle sine barndoms år. Fra dette hus har hun vandret den millange, ensomme vei til hverdagens skole, og søndagens kirke. Herfra dro hun ut for å søke tjeneste. Herfra reiste hun til et fremmed land, og til møtet med min far.

Uten dette var jeg ikke til.

Her er mine røtter. Mitt sted på jorden.

Brått hører jeg en stemme.

– Du ser dum ut, sier Petronius.

– Dum?

– Du stirrer ut av vinduet. Du ser intet. Ditt blikk er tomt. Du er ikke her.

Jeg ler.

– Jeg er her nå. Jeg ser ut av vinduet, og ser en flik av min færøyske bygd. De som bor og lever her godtar meg som en som hører til. Jeg er hjemme her.

– Du er ikke så dum allikevel, siger Petronella.